# McCartney til Danmarkar

*2. mai verður Paul McCartney at hoyra Parkini í Keypmannahavn, og Atlantic Airways og Flogfelag Føroya hava longu fingið fyrispurningar frá fólki um at skipa fyri ferð í sambandi við konsertina. Hesa myndina tók Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna,av Paul McCartney, sum hon av tilvild møtti á einum náttklubba í New York í november í fjør*



**Paul McCartney fer fyrst í mai mánaði at hava konsert í Danmark, har hann fer at spæla 36 hitt hjá sær. 22 av sangunum eru frá Beatles-tíðini. Konsertferðin hjá McCartney sló 20 sølumet í USA í fjør, og var kosin tann besta ferðin í fjør**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Mánadagin fáa starvsfólkini hjá Billetmaskinen.dk og í sølubúðum hjá TDC úr at gera. Tá vera tey umleið 40.000 atgongumerkini til stóru konsertina við Paul McCartney í mai mánaði sett til sølu, og tað verður gravgangur eftir lepunum, sum kunnu føra fólk inn til konsertina við legenduna úr Beatles.

Tey, sum skipa fyri konsertum hjá Paul McCartney, hava júst boðað frá, hvar hann fer at spæla á Europa-ferð síni, og ein av konsertunum verður í Parkini í Keypmannahavn.

Hendan konsertin verður 2. mai, og Atlantic Airways og Flogfelag Føroya hava longu fingið fyrispurningar frá fólki um at skipa fyri ferð í sambandi við konsertina.

## Setti 20 met

Paul McCartney var ein av bestu poppkomponistunum í farnu øld. Saman við John Lennon skrivað hann stóran part av tónleikinum hjá The Beatles, og eisini eftir at bólkurin fór í søguna, hevur McCartney skrivað nógvar vælumtóktar sangir.

Í fjør var McCartney á konsertferð í USA, og hetta var vorðið sum konsertferð. Hann spældi øll hittini hjá sær, og fólk vóru næstan frá sær sjálvum fyri at fáa atgongumerki til konsertirnar.

20 sølumet vórðu sett kring USA, og virda tíðarritið Billboard helt, at McCartney hevði havt ársins konsertferð í 2002.

Konsertferðin, sum kallast »Back in the World«, er tann best eydnaða konsertferðin hjá McCartney síðani tíðina í The Beatles.

## 22 Beatles-sangir

Nú McCartney kemur til Europa at spæla, verður tað við somu sangum, sum hann spældi á ferðini í USA.

Hann spælir í hálvantriðja tíma, og talan er um 36 sangir. 22 av hesum sangum eru frá Beatles-tíðini, og onkrir av sangunum eru ongantíð áður framførdir live av meistaranum sjálvum í Europa. Hann spælir eisini sangir frá tíðini við Wings og aðrar sangir hjá sær.

– Eg hevði tað serliga gott á konsertferðini í USA. Í staðin fyri at kenna meg troyttan við øllum konsertunum, so var lyftur upp. Eg gleði meg veruliga at hava konsertir aftur í Europa, sigur Paul McCartney í tíðindaskrivinum, sum konsertfyrireikararnir hava sent fjølmiðlunum.

Saman við legenduni fara virdir tónleikarar at spæla. Bólkurin er mannaður við Rusty Anderson og Bryan Ray, sum spæla gittar, Paul Wickens spælir ljómborð, og Abe Leboriel yngri spælir trummur. Sjálvur spælir McCartney bass og syngur.

Atgongumerkini til konsertina í Parkini verða sett til sølu mánamorgunin, og tey kosta millum 500 og 550 krónur. Tey umleið 40.000 atgongumerkini vera seld eftir eina lítlari løtu, so skal onkur sleppa innar til kanska mest umtalaðu konsertina í Danmark í ár, so ræður um at fara tíðliga upp og at brynja seg við toli.



# Tunnilin undir Tangafirði triðjur í røðini

**- Seinast, eg var á Toftum fyri nógvum árum síðan, mundi blivið borgarakríggj, tí tá var renovatiónin á skránni, segði Heini Olsen**

*Heini Olsen ásannaði, at lagið á Toftum var betur týskvøldið enn í sínari tíð, tá ið renovatiónin var á skránni.*



TUNNILSSAMBAND
*Vilmund Jacobsen*

Heini Olsen, verkfrøðingur, sum í fleiri ár hevur starvast hjá landsverkfrøðinginum, eins og hann eisini hevur starvast úti í stóru verð, var við á fundinum á Svangaskarði, tá ið áhugabólkurin legði fram uppskotið um tunnil millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið.

Heini segði, at hann kendi seg eitt sindur rørdan aftur at verða á Toftum.

- Hýrurin góður, nú tosað verður um undirsjóvartunnil. Men seinast, eg var á Toftum fyri nógvum árum síðan, mundi blivið borgarakríggj, tí tá var renovatiónin á skránni, segði hann.

Hetta var nevniliga um tað mundið, tá ið ætlanin var at leggja brennistøðina hjá IRF á Høganesi.

Mótstøðan móti hesi ætlan var rættiliga stór, og úrslitið gjørdist, at eingin brennistøð varð bygd í kommununi.

Heini greiddi frá tí arbeiði, sum landsverkfrøðingurin áður hevur gjørt í samband við ein møguligan tunnil millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið.

## Triðjur í røðini

Hann vísti nøkur kort fram, har ymiskar linjur fyri ein komandi tunnil vóru settar út í kortið.

Ivleyst er vitanin um tunnilsgerðir og havbotnin størri í dag, enn hon var tá, og tí kundi tann, sum var áskoðari á fundinum, fáa ta fatan, at nøkur av uppskotum landsverkfrøðingsins ikki samsvara heilt við uppskotið hjá áhugabólkinum um, hvar ein møguligur tunnil eigur at verða bygdur.

Heini Olsen segði, at landsverkfrøðingurin í sínari tíð hevði undirsjóvartunnilin millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið, sum tann triðja í røðini av møguligum undirsjóvartunlum.

- Fyrstur á "listanum" var tunnilin undir Vestmannasundi, síðan tunnilin undir Leirvíksfirði og til seinast tunnilin undir Tangafirði, segði hann.

# Tað er bara ein spurningur um tíð

**Løgtingsmaðurin, Alfred Olsen, segði seg onga løtu ivast í, at tunnil verður bygdur millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið**

*- Tunnilin millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið kemur. Tað er bara ein spurningur um tíð, sigur Alfred Olsen, løgtingsmaður.*



TUNNILSSAMBAND
*Vilmund Jacobsen*

Løgtingsmaðurin, Alfred Olsen, helt uppskotið hjá áhugabólkinum um tunnilssamband, vera ógvuliga áhugavert.

Hann segði, at nakrir teirra, sum sita í bólkinum, kenna trupulleikarnar við óneyðuga longu og mangan truplu farleiðini, tí hetta eru menn, sum dagliga ferðast millum Skálafjørðin og høvuðsstaðin.

## Kvalifiseraðir

- Haraftrat kemur, at hesir menn eru ikki hvør sum helst í hesum viðfangi.

Hann nevndi Tummas Eliasen, sum fíggjarkønan, Niclas Foldbo við sínum drúgvu tunnilsroyndum og at enda Martin Heinesen, ið er jarðfrøðingur.

- Hetta mugu sigast at vera væl kvalifiseraðir menn til at gera eitt slíkt uppskot, helt Alfred.

Løgtingsmaðurin segði seg onga løtu ivast í, at tunnil verður bygdur millum Skálafjørðin og høvuðsstaðarøkið.

- Tað er bara ein spurningur um tíð, legði hann aftrat.

## Eingin ivi

Alfred Olsen hugleiddi eisini um teir fyrimunir og møguleikar, ein slíkur tunnil kemur at skapa.

Hann tosaði eisini um øktu ferðsluna, sum kemur í kjalavørrinum av einum so góðum sambandi millum Eysturoynna og høvuðsstaðin.

- Eg eri samdur í, at prísurin at ferðast gjøgnum tunnilin eigur at vera so lágur, at eingin ivi skal vera um, hvønn veg fólk velja at koyra, tá ið tey koma á Skipaneskrossin, segði Alfred Olsen, løgtingsmaður.

# Teinurin stytstur úr Æðuvík

TUNNILSSAMBAND
*Vilmund Jacobsen*

Heini Olsen, sum umboðaði landsverkfrøðingin á tunnilsfundinum, vísti á, at tann teinurin, sum er stytstur millum Eysturoynna og høvuðsstaðarøkið, er teinurin úr Æðuvík til Hvítanesar.

- Eg vil meta, at teinurin, sum er stungin út í kortið í uppskotinum, sum fyriliggur, er nærri 10 enn 9 km. Hinvegin vístu okkara kanningar, at leiðin úr Æðuvík og yvir á Hvítanes er bert 6,5 km.

Samstundis, sum Heini segði hetta, vísti hann til úttalilsini hjá Martini V. Heinesen, jarðfrøðingi um, at tess meira í ein útnyrðing, tunnilin verður otaður, jú betri kann væntast, at lendið verður. Her er størri møguleiki fyri at koma ígjøgnum miðfláirnar, ið vísa seg at vera tær best egnaður til tunnilsgerðir.

- Eg trúgvi ikki, at nakað er til hindurs fyri at byggja ætlaða tunnilin – bara man hevur peningin, segði Heini Olsen.